## 700 fólk til konsert

**Keldan:** Ikki færri enn 700 fólk høvdu leitað sær í Kelduna í Skálafirði hetta illfýsna týskvøldið, har tey fingu eitt eitt langt kvøld saman við einum av „heitastu“ bólkunum innan gospeltónleikin í løtuni. Í meira enn tveir tímar bergtóku Ernie Haase og hansara menn fjøldina, sum við klappi, látri, tárum og sangi aktivt tóku lut í løtuni. Ein av viðmerkingunum frá forsangaranum var, at hann merkti ein heilt serligan opinleika frá fjøldini: "Tað var sum um at tey ótu hvørt orð, ið kom av pallinum, og vildu allatíðina hava meira“. Eitt lítið video-klipp frá pallinum kann síggjast á hesi slóðini: HYPERLINK „http://www.youtube.com/user/ehssq“ http://www.youtube.com/user/ehssq.



## 50 sluppu ikki inn

**Klaksvík:** Øll árini síðani húsarhaldsskúlin varð stovnaður, hevur áhugin ímillum tey ungu verið stórur. Og skúlin er framvegis populerur. Pláss er bert fyri 21 næmingum, men til skeiðið sum byrjar í august fingu tey umsóknir frá umleið 70 ungdómum. - So vit noyddust at siga nei til útivið 50 teirra, sigur Jóhanna á Tjaldrafløtti, stjóri á skúlanum við Norðlýsið. Sum støðan er ídag, so skal ein vera meiri enn heppin, um ein skal sleppa inn á Húsarhaldsskúla Føroya.

# Nýggj útbúgving í Klaksvík

**Ein arbeiðsbólkur er nú settur at skipa eina matvøru- og tænastuútbúgving í Klaksvík. Arbeiðast skal skjótt, soleiðis at hon kann setast í verk longu frá komandi skúlaári**

ÚTBÚGVING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Nýggj útbúgving innan matvøru og tænastu verður væntandi sett á stovn í Klaksvík longu í summar*
*Mynd: husarhaldsskulin.fo*

**Klaksvík:** Talan er um eitt samstarv millum Tekniska Skúla í Klaksvík, Húsarhaldsskúla Føroya og Kokkaskúlan á Klaksvíkar Sjómansskúla.

Gongst eftir ætlan, verður farið verður undir at skipa hesa matvøru- og tænastuútbúgvingina sum eitt støðisár longu frá komandi skúlaári.

Arbeiðsbólkurin skal taka støði í einum áliti frá 2004 við heitinum: „Uppskot um dagførda skipskokkaútbúgving og tilráðing um nýggja matgerðaútbúgving og at samskipa hesar báðar í eina yrkisútbúgving, sum skal geva førleika til køksarbeiði og matgerð umborð á skipum og á matstovum o.l.” .

Við undantaki av skipskokkaskeiðnum, sum Klaksvíkar Sjómansskúli bjóðar út, er í dag einki tilboð í Føroyum innan matvøru- og tilhoyrandi tænastuútbúgvingar.

### Víðka útboðið

Landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, vísir á, at nú vaksandi arbeiðsloysi millum ung ger um seg, er týdningarmikið at víðka og breiðka útboðið av útbúgvingum.

- Vit hava í Føroyum eitt einastandandi tilfeingi innan mat, bæði á sjógvi og landi. Og vit kundu fingið nógv meira burturúr hesum tilfeinginum, sigur mentamálaráðharrin. Og hon leggur aftrat:

- Eg rokni við, at um vit bera okkum skilagott at, og allar góðar kreftir í økinum taka lógvatak saman, kunnu vit fáa nógv meira burturúr hesi íløgu, enn vit duga at ímynda okkum.

Hóast tíðin er knøpp, vónar hon, at til ber at taka næmingar inn til hesa útbúgving komandi skúlaár.

Í arbeiðsbólkinum sita: Rúni Heinesen, skúlastjóri á Tekniska Skúla í Klaksvík, og hann er formaður; Pole Mikkelsen, stjóri á Klaksvíkar Sjómansskúla; Jóhanna á Tjaldrafløtti, leiðari fyri Húsarhaldsskúla Føroya; Karin K. Petersen, lærari á Tekniska Skúla í Klaksvík; Eyðun Gaard, leiðari á Yrkisdeplinum og Niclas Hovgaard, fulltrúi í Mentamálaráðnum sum er skrivari.

# Bátar hittast aftur í Vestmanna

**Eins og undanfarnu átta árini verður aftur í ár skipað fyri Bátastevnu í Vestmanna. Hesuferð verður stevnan hildin leygardagin 15. mai**

BÁTAR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Vestmanna:** Eyðkenni fyri hesa vælumtóktu stevnuna eru, at her hittast sera nógv fólk at hava tað hugnaligt saman í bátum, húsvognum, á motorsúkklum og á ymiskan annan hátt.

Bátastevnan í Vestmanna verður á mangar mátar eins og tann í fjør, men kortini er ein broyting: Umstøðurnar hjá bátum og húsvognum verða nú enn betur enn tær hava verið. M.a. verður gjørt meira pláss til hvønn húsvognin, eins og fleiri bátabrúgvar verða lagdar út.

Bøtt verður haraftrat um umstøðurnar at fáa atgongd til vatn- og elveiting, og saniteru viðurskiftini verða løgd betur til rættis hjá bæði bátum og húsvognum.

Vestmanna Ítróttarfelag vónar, at tiltakið aftur í ár fær góða undirtøku. Ágóðin av tiltakinum fer til liðugtgerð av kapproðrarneystinum.

# Hvalbingar fáa nýggjan prest í mai

**Søkt verður nú eftir sóknarpresti til Suðuroyar norðara prestagjald við sæti í Hvalba. Eingin prestur hevur verið síðani 1. januar, tá avloysarapresturin, Símun P. Jacobsen fekk fast starv á Strondum**

PRESTAR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Eftir 1. mai fara hvalbingar helst ikki longur at liggja í prestaloysi*

**Hvalba:** Tveir sóknarprestar eru í prestagjaldinum. Presturin á Tvøroyri, Jónsvein Bech er kirkjubókaførandi og jarðarferðarmyndugleiki.

- Tænastan hjá nýggja prestinum verður skipað í samstarvi millum prestarnar, sigur Jógvan Fríðriksson, bispur á heimasíðuni hjá fólkakirkjuni.

Miðað verður fram ímóti at embætið verður sett 1. mai 2010.

Í prestagjaldinum eru fýra kirkjusóknir: Sandvík, Hvalba, Tvøroyri og Fámjin. Umleið 1.950 fólk búgva í prestagjaldinum.

Upplýst verður, at presturin er í ávísan mun knýttur at Suðuroyar sunnara prestagjaldi, har Patrick de Neergaard er prestur í Vági.

Til hetta starvið er tænastubústaður, sum er prestagarðurin í Leirum í Hvalba.

- Sóknarpresturin hevur skyldu at búgva í prestagarðinum, leggur bispur dent á.

### Aðrar tænastur

Umframt tær vanligu kirkjuligu tænasturnar, fær nýggi presturin eisini aðrar uppgávur.

Afturat kirkjunum eru nevniliga onnur tænastustøð. Gudstænastur verða somuleiðis hildnar á ellis- og røktarheimi og í sambýlum.

Sagt verður, at umsøkjarar skulu hava lokið prógv í gudfrøði, og annars lúka krøvini, ið lóggávan annars setir fyri at gerast prestur í fólkakirkjuni í Føroyum.

Umsøkjarar ið ikki enn eru prestvígdir, kunnu eisini søkja starvið. Hetta kann gerast við at senda váttan frá pastoralseminarium saman við umsóknini.

Bispur vísur á, at umsøkjarar, ið ætlandi verða lidnir at lesa gudfrøði og pastoralseminariið í summar kunnu søkja. Umsóknarfreistin er sett til 15. mars kl. 15.

Annars verða prestastørv eisini leys at søkja í Fuglafirði og í Hvalvík í næstum.